NØVN Í VIKUNI

Albinius Johannesen, Tvøroyri 90 ár

Hin 27. september var ein stórur dagur úti á Sevmýri, henda dag fylti Albinius Johannesen 90 ár.

Tað at hann nú í nógv ár hevur búð á Sevmýri er væl skiljandi, tí støðufastari áskoðara hjá TB bæði til dystar og venjingar tann tíð tað var skal leingi leitast eftir, og er hetta heldur ikki løgið, tá hugsað verður um, at bæði synir og abbasynir hava verið trúgvir TB spælarar og enntá sum høvuðsstuðlar á landsliðið okkara.

Eisini eigur hann langabbadøtur ið gera seg galdandi í fremstu røð innan sveimjingina,bæði innanlands og til oyggjaleikar.

Tá hann var ungur, vóru ikki umstøður hjá honum at luttaka á fótbóltsvøllinum, tá Albinius hevur verið sjómaður alt sítt lív. Og vit sum kenna umstøðurnar minnast frøðina, tá dekksbáturin »Kunoy« kom inn eftir fjørðinum, tá setti hesin útróðrarmaðurin fótin á egið dekk.

Eitt, ið hevur eyðkent Albinius er hansara altíð lætta lyndi, ja hvør minnist ikki tá hann javnan tók harmonikuna fram, og var hetta ein háttur at lætta sinni eftir ein mangan tungan og strævnan dag.

Tá ein fær loyvi at liva so leingi, og vera so byrgur sum hann er, tá leita tankarnir til hann sum øllum ræður.

Eitt so langt lív vil altíð innihalda bæði gleði og sorg, tí eisini hevur sorgin vitjað, men tí var vunnið á, tí undir lið hansara hevur hann haft konuna Karolinu, og hevur hon verið honum ein stórur stuðul nú tey hava haft gullbrúdleyp.

Men at Albinius hevur búð á Sevmýri er rætt, tó má ikki gloymast at hann er VALARI av rætta slagnum, og sum slíkur støðufastur politiskt, sum granni og vinur, ynski eg tykkum eitt blítt lívskvøld.

Sverre

Politistur

Eitt arbeiði við avbjóðingum

Politiið er eitt av stóru arbeiðsplássunum í Føroyum. Her hevur tú møguleikan í fullan mun at brúka tínar fakligu royndir og tínar persónligu eginleikar í einum sjálvstøðugum arbeiði við nógvum avbjóðingum og møguleikum at menna st.

Høvuðsuppgávan hjá politinum er:

- At vera sjónligt og skapa trygleika og trygd fyri borgaran og samfelagið
- At fyribyrgja, at ósemjur, ófriður og kriminalitetur ikemur
- At fara eftir, kanna og uppklára framdan kriminalitet
- At tryggja, at galdandi reglur vera hildnar og fyribyrgja, at vanlukkur henda

Politiið hevur til dømis ein høvuðsleiklut í arbeiðinum at fyribyrgja kriminalitet – ikki minst millum børn og ung.

Grundarlagið fyri politiarbeiðinum er virðingin fyri rættartrygdini hjá borgarunum.

Eitt arbeiði allan sólarringin

Arbeiðið hjá politinum verður gjørt í tøttum samstarvi í politistaliðnum millum einstøku politistarnar og politistøðirnar.

Her er eitt gott samanhald, og arbeiðið byggir á kunnleika til og nýtslu av førleikanum hjá einstaka politistinum fyri at rokka felags málum. Sum politistur ert tú altíð ein partur av liðnum – um tú ert til arbeiðis ella um tú hevur frí. Atlitið til borgaran og samfelagið er altíðina í miðdeplinum, og tú veitst ongantíð frammanundan, hvat dagurin ella náttin bjóðar.

Løn og útbúgving

Longu frá fyrsta degi sum politistur í royndartíð fært tú eina kappingarføra løn. Harafturat fært tú pensjón og ymisk ískoyti fyri tænastu á skiftandi tíðum. Royndartíðin er 3 ár. Aftaná tað fært tú – um tú ert egnaður til politiarbeiðið – fast starv sum politistur.

Menning og karriera

Sum politistur hevur tú góðar møguleikar fyri eini karrieru. Politiið hevur eina røð av serskeiðum – og so eru eisini leiðaraskeiðini fyri politistar, sum hava hug at arbeiða við leiðslu. Harafturat er stór trygd í starvinum og møguleikar at fáa arbeiði innan ymsar deildir ella aðra staðni í landinum.

Ynskir tú at vera við?

Vit seta eingi formlig krøv um útbúgving ella lívsroyndir fyri at søkja starv hjá politinum. Men vit leggja dent á tínar fyritreytir at verða ein góður politistur, sum kann loysa uppgávurnar hjá politinum í samsvar við reglur og virðir í samfelagnum og við virðing fyri einstaka persóninum og rættindum hansara.

Vit vilja fegin seta fólk í starv, sum ymisliga umboða føroyingin við atliti til sosialt og mentanarligt støði – og vit ynskja eitt hóskandi býti millum kvinnur og menn.

Treytir sum skulu vera loknar, áðrenn tú søkir:

- Tú ert fyltur 21 ár
- Tú hevur føroyskan/danskan heimarætt
- Tú hevur góða heilsu, vanliga hoyrn og vanliga eygsjón
- Tú hevur koyrikort til persónbil

Meira kunning

Ert tú ið ynskja meira at vita, kanst tú venda tær til politistøðina á staðnum, ella politistøðina í Tórshavn, at fáa vegleiðing, spurningar svaraðar og kunningartilfar útflýggjað ella sent.

Føroya Landfúti
Politistøðin
Jónas Broncksgøta 17
Boks 3018
FO-110 Tórshavn
Tlf. 31 14 48 · Fax 31 82 66
Heimasíða: www.politi.fo

[illegible]

Eivind vrakaður

Bygdaráðsformaðurin á Strondum slapp ikki á uppstillingarlistan hjá Sambandsflokkinum til løgtingsvalið

Mong hildu, at Eivind Jacobsen, sum er bygdaráðsformaður á Strondum, fór at stilla upp til løgtingsvalið, men tá fyrsti uppstillingarfundurin hjá Sambandsflokkinum var á Strondum, var Eivind ikki settur á listan. Hetta skriva Fregnir í gjár.

Eivind Jacobsen hevur rættiliga gjørt vart við seg farna árið. Hann hevur havt nógvar viðmerkingar í bløðunum, og hann hevur verið rættiliga bersøgin.

Men tað er okkurt sum bendir á, at sambandsfólk ikki hava hug at seta erliga sambandsmannin á uppstillingarlistan til løgtingsvalið.

Tá fyrsti uppstillingarfundurin var á Strondum, varð Tummas Eli Høj Joensen tikin fram um sambandsumboð hjá strandingum og skálamonnum.

– Eg havi ongar persónliga ambitiónir um at koma á ting, men eg veit, at eg eri munurin, sum hevði tryggjað samband fram um loysing, sigur Eivind Jacobsen við Fregnir.

Hóast Eivind heldur fyrsta uppstillingarfundin verða løgnan, so tekur hann avgerðina til eftirtektar.

Eivind Jacobsen var ikki á uppstillingarfundinum, tí hann var á øðrum fundi hjá Sambandsflokkinum sama kvøld.

ek

†

Petur Meinert Hansen

ættaður úr Klaksvík, búsitandi í Elduvík,

andaðist á Landssjúkrahúsinum hósdagin 27. september, 59 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Elduvíkar kirkju sunnudagin 30. sept. kl. 14.00.

Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum, sum gjørdu mær 100 ára føðingardagin 1. august 2001 til ein minnisríkan dag.

Tøkk tit, ið ringdu, sendu brøv, kort, blómur og gávur.

Tøkk fyri vøkur orð, ið søgd vóru, og vakrar sangir, ið yrktir vóru.

Tøkk til tykkum, ið stákaðust og gjørdu dagin hugnaligan, og til tykkum mongu, sum gjørdu tykkum stundir at heilsa uppá meg.

Ein serlig tøkk til bygdaráðini í Funningi og á Eiði og leiðslu og starvsfólk á Korndalsbýlinum, sum skipaðu fyri.

Jesus signi tykkum øll.

Heilsan
Malla Reynbúð

Tað var lív í

Fleiri enn 1500 børn savnaðust í gjár til barnafagnað í ítróttarhøllini á Hálsi. Børnini høvdu nógv at takast við

Fleiri enn 1500 børn úr øllum landinum brúktu í gjár dagin í ítróttarhøllini á Hálsi, har barnafagnaður var
Mynd: Jens Kristian Vang

BØRN
Eyðun Klakstein

Børn úr øllum landinum savnaðust í gjár í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn, har Javni skipaði fyri stórfingnum barnafagnaði.

Tað var rættiligt lív í, tá tey meira enn 1500 børnini gjørdu innrás í høllini, og tey høvdu nógv at fara í holt við.

Ymiskir verkstaðir vóru settir upp í høllini, og her kundu børnini millum annað royna seg í fiskibrunni, tey kundu mála andlitini og tey kundu mynda ymiskt úr ull.

Eina ferð áðrenn døgurða og eina ferð eftir døgurða kundu børnini royna at sparka bóltin í málið hjá Tróndur Vatnhamar, sum er málverji hjá B36. Hvussu trupult tað var, sigur søgan einki um...

Nógv at takast við

Umframt verkstøðini var eisini ein pallur gjørdur, at ymiskt undirhald var. Karl Martin Samuelsen sang barnasangir, Børn frá Dagstovninum á Argjum, sum hava givið fløgu út, sungu fyri børnunum, og næmingar spældu sjónleik.

Tá børnini komu í ítróttarhøllina fyrrapartin skuldu tey hava okkurt útklipp við sær, og tað skuldi tey hanga upp á eitt net.

Klokkan 10.30 varð dagurin settur, og tá bjóðaði Jarvin Feilberg Hansen, nevndarlimur í Javna, børnunum vælkomin, og Maud Wang Hansen, sum umboðaði Føroya Pedagogfelag, setti barnafagnaðin.

Frá klokkan 11.00 og langt út á seinnapartin vóru tey ymsu tiltøkini í høllini, og børnini vóru hugagóð í holt við teir nógvu møguleikarnar.

Tá børnini fóru heimaftur, lat Javni teimum eitt tinganeyst at hava heim við sær.

Meira er um barnafagnaðin á síðu 23.

LEYGARDAGIN 29.09.01

ALLAR RAMMUR - 50%

STÓR ÚRVAL AV RAMMUM

BERT GALDANDI LEYGARDAGIN 29.09.01
BERT GALDANDI LEYGARDAGIN 29.09.01
BERT GALDANDI LEYGARDAGIN 29.09.01

Kodak EXPRESS
fotobúðin

www.foto.fo Postboks 1016 tlf. 311661 110 Tórshavn e-post foto@foto.fo